# UPPTØKUREGLUR

til dagstovnar í Fuglafjarðar kommunu

**§1**
Dagstovnarnir í Fuglafjarðar kommunu hava dagstovnapláss til børn í aldrinum 10 mánaðir til og við 2. flokk.

**§2**
Barnið, og í minsta lagi annað av foreldrunum, skulu verða skrásett í kommununi fyri at fáa dagstovnapláss.

**§3**
Foreldur, ið hava í hyggju at flyta til Fuglafjarðar kommunu, kunnu skriva barnið á upptøkulista 6 mánaðir áðrenn flutt verður til kommununa.

Ættleidd børn kunnu verða skriva á upptøkulista tá foreldur, ið ættleiða, kunnu vísa váttan, at teimum er ávíst barn.

**§4**
Kommunan kann í serligum førum gera undantak frá § 1 og 2, har Barnaverndartænastan hevur givið tilmæli.



**§5**
Søkt verður um dagstovnapláss á heimasíðuni hjá Fuglafjarðar Kommunu Umsókn um dagstovnapláss- Fuglafjarðar kommuna (fuglafjordur.fo). Øll, sum søkja dagstovnapláss, skulu hava skrivligt svar frá kommununi, um móttøku av umsóknini. Í seinasta lagi 2 mánaðir áðrenn ynskta upptøku, fáa foreldrini nærri kunning frá Sosialu deild.

**§6**
Tá ið pláss er tøkt, skal fyrsta barni á upptøkulistanum hava tilboð um pláss. Upptøkulistin er stýrdur út frá:

1. Nær foreldrini hava sent umsóknina um dagstovnapláss og
2. Nær foreldrini ynskja upptøku

Tó kann aldurs- og kynsbýtið verða tillagað skipanini/stovninum. Kommunan hevur ikki loyvi til at sýta einum barni frá upptøkulistanum pláss.

**§7**
Um foreldur fáa tilboð um pláss, svarandi til tað tey hava søkt, og tey takka nei, verður barnið tikið av upptøkulistanum.

Um foreldur fáa tilboð um pláss á einum stovni, sum ikki var teirra fyrsta raðfesting, hava tey møguleika at takka nei og útseta upptøku eina ferð uttan at barnið verður tikið av upptøkulistanum.

**§9**
Børn við serligum avbjóðingum kunnu koma framum á upptøkulistanum í teimum førum, har viðkomandi myndugleiki hevur givið eina nágreiniliga lýsing at støðuni hjá barninum.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**§10**
Foreldur kunnu søkja um, at barnið fær farloyvi frá dagstovnaplássinum í upp til 1 ár í senn, við trygd fyri, at barnið fær dagstovnapláss aftur í kommununi, tá farloyvistíðin er úti. Treytin fyri farloyvi er, at barnið er burtur frá dagstovnaplássinum í minsta lagi 6 mánaðir. Í serligum førum kann víkjast frá hesi reglu.

**§11**
Tá barnið gevst á dagstovninum, skal skrivlig uppsøgn gevast til dagstovnin. Uppsagnarfreistin er ein mánaði frá tí fyrsta í tí mánaðinum aftaná at uppsøgnin er latin inn.

**§12**
Umsóknarblað um frípláss fæst á heimasíðuni hjá Fuglafjarðar Kommunu, www.fuglafjordur.fo

**§13**
Foreldur kunnu kæra avgerðir um upptøku til Sosialu nevnd í Fuglafjarðar kommunu

Samtykt á býráðsfundi tann 9/9-2022



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo